# Fjølmiðlanevndin - avgerðir

| Mál nr. :<br>16/00231 | Lóg:<br>§ 43 í løgtingslóg nr. 45 frá 16. mai 2006 um fjølmiðlaábyrgd, sum broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2007.<br>Leiðreglur um góðan fjølmiðlasið frá 14. mai 2008. | Avgerð tikin:<br>28.11.2016 |
|---|---|---|


**Samandráttur:**

Eik kærir um grein í Sosialinum 17. juni 2016, sum er skrivað av B.H. Kært verður eisini um annað tilfar við tilknýti til greinina.

Nevndin heldur ikki, at grundarlag er fyri at finnast at nøkrum viðurskiftum viðvíkjandi greinunum hjá Sosialinum.

Nevndin viðmerkir tó, at Sosialurin átti at vanda sær betri um orðavalið, og er tað t.d. ikki hóskandi at brúka orðið skattasnýt, ella reka framundir soleiðis at lesarin fær fatanina av, at talan er um skattasnýt. Miðlarnir hvørki kunnu ella skulu taka støðu til rættin hjá EIK til frádráttin, ella um EIK tilvitað hevur tikið frádráttin av órøttum, áðrenn hetta veruliga er staðfest, men grundarlag er hjá miðlunum at seta spurnartekin við hetta. Víst verður til prinsippið um, at ongin er sekur áðrenn hann er dømdur, som framgongur av leiðreglu 4.5. Tann støða, sum leiðregla 4.5 beinleiðis fevnir um, er tó ikki relevant í hesum máli. Sosialurin letur tó generelt skuldarspurningin standa opnan, og tað bøtir um støðuna.

**Vísandi til omanfyri standandi metir nevndin, at grundarlag ikki er fyri at geva Sosialinum átalu viðvíkjandi greinini "Her haltar argumentatiónin" tann 17. juni 2016, ella greinunum áðrenn hetta.**


Eik kærir um grein í Sosialinum 17. juni 2016, sum er skrivað av BH. Kært verður eisini um annað tilfar við tilknýti til greinina.

## Kærarin

Ført verður fram, at greinin fleiri ferðir staðfestir, at Eik hevur villleitt og sagt ósatt. Journalisturin grundar í høvuðsheitum greinina á egna gjøgnumgongd av sera avmarkaðum tilfari í einum ógvuliga torgreiddum máli um skattafrádrátt, og í millumyvirskriftum staðfestir journalisturin, nær talan er um villleiðing ella ósannindi. Greinin er skaðandi og niðrandi fyri Eik Banka og leiðslu bankans.

Greinin tykist lutvíst at taka upp aftur reingjandi orðingar um villleiðing, sum í greinarøð í Sosialinum, dagfest 15. apríl 2016 løgdu Eik og leiðslu bankans undir villleiðing og skattasnýt. Bankin valdi ikki at kæra ta greinarøðina, tí bankin royndi í staðin at greiða journalistinum, sum skrivaði greinarøðina, frá samanhanginum í hesum torskilda máli, sum ósemja er um.

# Fjølmiðlanevndin - avgerðir

Kortini heldur journalisturin fram við ákærandi skrivingini, og tí er sera viðkomandi í hesi kæru eisini at hyggja nærri at greinarøðini frá 15. apríl 2016. Í báðum førum er talan um ákærandi yvirskriftir um villleiðing, og í greinarøðini frá 15. apríl 2016 verður ”skattasnýt” brúkt bæði í yvirskrift og teksti. Greinin frá 17. juni 2016 tykist hava til endamáls at halda lív í ákærunum móti Eik, sum byrjaðu í greinarøðini í Sosialinum 15. apríl 2016, har Sosialurin í almenna rúminum royndi at reingja málið og broyta tað frá at vera eitt mál um skattafrádrátt til at vera eitt mál um møguligt skattasvik og villleiðing av TAKS.

Heitt verður tískil á nevndina um at viðgera greinarøðina í Sosialinum frá 15. apríl 2016 parallelt við greinina frá 17. juni 2016, tí talan er í roynd og veru um endurtøkur og tætt tilknýti millum greinarnar, og sostatt verður heitt á Fjølmiðlanevndina um at víkja frá kærufreistini fyri greinarøðini frá 15. apríl 2016 sambært lógini um fjølmiðlaábyrgd, grein 34, stk. 4.

Málið snýr seg um eina fakliga ósemju um ein skattafrádrátt, men við støði í ónevndum keldum og einum avmarkaðum innliti í málsgongdina, skjølini í málinum og sakkunnleikan, sum krevst í skattamálum, loyvir journalisturin sær í greinini frá 17. juni 2016 at leggja Eik og leiðslu bankans undir villleiðing og at siga ósatt. Talan er um orðingar, sum hava beinleiðis tilknýti til greinarøðina frá 15. apríl 2016, har Sosialurin segði seg hava avdúkað villleiðing og skattasnýt í Eik, uttan at leggja fram nakað skjalprógv fyri hesum grovu ákærum.

Sosialurin hevur sum heild viðgjørt málið uttan haldgóðar keldur og uttan nøktandi kelduvandni, og soleiðis hevur málið eisini verið viðgjørt í fleiri umførum í tíðindaflutninginum sum heild í Miðlahúsinum m.a. í samstarvi við Kringvarp Føroya.

Tað er undrunarvert, at t.d. eingin óheftur skattaserfrøðingur ella óheftur grannskoðari er kelda hjá Sosialinum, tá blaðið framhaldandi loyvir sær at ákæra Eik og leiðslu bankans í einum so torgreiddum máli um skattafrádrátt, har sjálvt serfrøðingarnir eru ósamdir. Journalisturin tykist halda tað vera nóg mikið, at hon at kalla einans viðger málið saman við sær sjálvari og einari høvuðskeldu, sum kortini ongantí verður roynd í interviewstøðu.

Tað eyðkennir viðgerðina í Sosialinum, at málið verður viðgjørt úr sjónarhorninum hjá tí partinum, sum er ímóti skattafrádráttinum – t.e. við øðrum orðum úr sjónarhorninum hjá J.A.H., sum áður hevur umboðað Finansiel Stabilitet í nevndini í Eik, sum var fyrsti stjórin í nýggja Eik. Tað er eyðsæð, at J.A.H. er høvðuskeldan og fóðrar journalistin, tí hansara sjónarmið ganga áhaldandi aftur í skrivingini. Kelduvandnið mótvegis hesi høvuðskelduni hjá Sosialinum er als ikki til staðar. Journalisturin tykist trúgva fult og heilt øllum, sum J.A.H. sigur í hesum máli, og tað er eyðsæð, at tulkingar og niðurstøður hjá journalistinum sostatt taka støði í bert einari síðu av sakini.

Í veruleikanum er talan um eitt trúnaðarmál, tí tað snýr seg um skattaviðurskifti hjá einum løgfrøðiligum persóni, Eik Banka, sum bankin ikki hevur skyldu til at viðgera í fjølmiðlunum. Tá málið so kortini er komið út í almenna rúmið, hevur leiðslan í Eik roynt at svarað spurningum, eins og nevnt omanfyri, m.a. á fundi við journalistin mánadagin 2. mai 2016. Men eftir at hava staðfest, at journalisturin viðger málið úr bert einum sjónarhorni uttan nøktandi fakligt innlit og grundarlag, samstundis sum hon helst er tongd at høvuðskelduni, hevur leiðslan mist álitið á journalistinum og hennara viðgerð av málinum.

# Fjølmiðlanevndin - avgerðir

Eik Banki og leiðslan í Eik hava fingið eina órættvísa viðferð í greinini, ”Skattamálið - Her haltar argumentatiónin”, sum í fleiri førum kemur til reingjandi niðurstøður um villleiðing og ósannindi. Sama ger seg galdandi fyri greinarøðina frá 15. apríl 2016 og aðrar partar av tíðindaflutninginum hjá Miðlahúsinum í hesum máli. Talan er um fleiri brot á leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið, sum ítøkiliga verður víst á í gjøgnumgongdini av greinini.

Síðani verður greinin gjøgnumgingin í mun til leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið.

Í skrivi frá 30. september 2016 ger Eik viðmerkingar til viðmerkingarnar hjá Sosialinum.

**Sosialurin**

Søgan um skattamálið hjá Eik livir upp til øll vanlig tíðindakriteriu. Søgan er sera aktuell, tá ið Sosialurin valdi at fara undir viðgerðina av málinum. Hon hevur eisini sera stóran týdning fyri fólk, tí skattafrádrátturin á knappar 100 milliónir eru pengar, sum føroyski skattgjaldarin annars hevði fingið ágóðan av.

Ósemjurnar í hesum máli eru stórar. Og ivi er um, hvørt Eik hevur rætt til frádráttin ella ikki. Tað sæst eisini í og við, at TAKS nú á øðrum sinni viðger málið. Tær keldurnar, sum hava lagt navn til greinarnar hjá Sosialinum í hesum máli hava stórt innlit og høgt trúvirði í mun til hetta mál.

Í februar í ár gerst greitt fyri almenninginum, at tað er ósemja í nevndini í Eik og TF Holding, nú J.A.H. fer úr nevndini í Eik – sum hann kortini skuldi, tí Fíggjarligt støðufesti seldi síðstu prosentini av bankanum til TF Holding. Men gamli stjórin í Eik fór fyri tíðina, tí innanhýsis ósemjur vóru í málinum um ein skattafrádrátt.

Miðlarnir fáa frænir av málinum, og tað eru ikki smávegis orðingar, sum danskir miðlar brúka í sínari viðgerð av málinum. 17. februar skrivar Berlingske Business greinina ”Eik Banke undersøges i betændt skattesag til 90 mio” og aðrir miðlar høvdu líknandi søgur. Hetta elvdi til, at føroysku miðlarnir eisini fóru at kanna málið. Kvf gjørdi í februar tí nakað burturúr skattamálinum, men tað var ikki fyrr enn í apríl, at Sosialurin valdi at prenta fyrsta blaðið, sum hevði stórt tema um skattamálið hjá Eik. Sosialurin hevði tá í mánaðir savnað inn tilfar frá varskógvarakeldum. Fundarfrásagnir frá nevndarfundum hjá Eik, frá fundum í grannskoðanini og so framvegis vóru til viðgerðar í fyrsta blaðnum um evnið, har eisini J.A.H., fyrrverandi stjóri í nýggja Eik skrivaði eina tíðargrein um málið. Fyrst er tað at siga, at tá ið fyrrverandi stjórin í einum banka er so hvassur í retorikkinum um ein skattafrádrátt á ikki minni enn 90 mió kr., so rættvísger tað í sær sjálvum, at miðlarnir taka málið upp. Hinvegin er tað at siga, at Sosialurin hevur sambært leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið rætt til at nýta og verja dulnevndar keldur, sum í hesum førinum.

Í mars 2016 fekk Sosialurin saman við Kvf innlit í innanhýsis skjøl úr Eik Banka, og skjøl, sum vóru gjørd í sambandi við søluna av Eik. Í hesum skjølum kom fram, at fyrsta nevndin og stjórnin fyri Eik hevði útgreinað, at tapið á 500 mió. kr. var farið fram í 3. ársfjórðingi 2010. Tað vil siga, at tað kom greitt fram, at tað ikki var farið fram í Eik Banka Føroya, nýggja Eik

Banka. Eisini kom fram í skjølum í sambandi við søluna, at grannskoðarin hjá Fíggjarligum Støðufesti, KPMG, hevði útgreinað, at ongir møguligir skattafrádráttir vóru í nýstovnaða bankanum. Hesi skjøl góvu tí ábendingar um, at nýggi Eik Banki burdi vitað, at tapið hoyrdi til gamla bankan, og at nýggi bankin tí ikki hevði rætt til ein frádrátt.

Í apríl fekk Sosialurin innlit í fleiri fundarfrásagnir frá nevndarfundum hjá Eik. Fundarfrásagnirnar vísa tað, sum okkara dulnevndu keldur eisini vátta – at uttanhýsis grannskoðarar hjá Eik søgdu, at bankin neyvan hevði rætt til frádráttin. Samstundis varð avrátt á nevndarfundi í Eik at senda fyrispurning til TAKS, tí nevndarlimir ikki mettu tað vera rætt, at nýggi bankin skuldi eiga skattafrádráttin á 90 mió. kr.

Sosialurin fekk innlit í skrivið, sum leiðslan í Eik sendi til TAKS eftir omanfyri nevndu nevndarsamtykt. Í skrivinum til Taks verður tó ikki spurt, um bankin hevur loyvi til at draga tapið frá – hóast tað var spurningurin, sum sambært okkara keldum og fundarfrásagnunum var til viðgerðar – men heldur varð spurt, hvussu skattafrádrátturin skuldi bókast.

Tá ið Taks kom til ta niðurstøðu á sumri í 2015, at Eik kundi draga frádráttin frá sum goodwill yvir 10 ár, valdu bæði grannskoðarar og nevndarlimir at rópa varskó. Hetta var gjørt um ársskiftið 2015/16, tá ið J.A.H. fór úr nevndini og Fíggjarligt Støðufesti sendi eitt skriv til Fíggjarmálaráðið um at taka málið uppaftur av nýggjum, og grannskoðararnir hjá Eik samstundis ikki vildu skriva undir roknskapin uttan átekning.

Sosialurin hevur prentað viðkomandi skjøl og víst á sitat frá varskógvarakeldum í greinarøðini um Eik banka, sum byrjaði í blaðnum í apríl í ár. Eik hevur tó einans valt at kæra greinina ”Her haltar argumentatiónin”, sum í roynd og veru er ein samanumtøka av mánaðum av viðgerð av málinum.

Sosialurin hevur eisini havt samrøður við eitt nú O.B., fyrrverandi nevndarformann í gamla Eik um málið. O.B., J.A.H., fyrrverandi stjóri í Eik og varskógvarakeldurnar hjá Sosialinum vátta tað sama – at leiðslan í Eik og TF Holding stendur einsamøll við uppáhaldinum um, at skattafrádrátturin er í lagi.

E.M. hevur eisini váttað fyri Kvf í viðgerðini av hesum skattamálinum, at nýggj skjøl eru komin fram í miðlunum, sum Taks frammanundan ikki kendi til.

Sosialurin hevur í fleiri umførum roynt at ringt, sent teldupost og smsboð til stjóran í Eik, S.S.J, fyri at fáa hann at viðmerkja tíðindaflutningin og málið annars. Tað hevur tó ongantíð enn eydnast Sosialinum.

Í kæruni leggur Eik Sosialin og blaðstjóran á Sosialinum, B.H., undir at einans hava eina høvuðskeldu. Tað er helst eingin ivi um, at bankin insinuerar, at J.A.H. er høvuðs- og einasta keldan hjá Sosialinum. Samstundis sigur Eik seg vita, at Sosialurin ikki hevur óheftar grannskoðarar ella skattaserfrøðingar knýttar at viðgerðini. Vit vilja taka frástøðu frá hesum uppáhaldinum hjá bankanum. Sosialurin hevur fleiri keldur í hesum málinum, sum vit til eina og hvørja tið verja. Og hvørjar keldur Sosialurin nýtur til bakgrundsvitan, faktatjekk, sum álítandi keldur í málinum og so framvegis, kann Eik ikki vita og er tað heldur ikki okkara uppgáva at formidla tað víðari. At J.A.H. slapp til orðanna í tíðargrein um málið í apríl í ár

kann neyvan nakar undrast yvir, tí hann er fyrrverandi stjóri í bankanum, og sat sum høvuðspersónur í nýggja bankanum, tá ið nevndi skattafrádrátturin kom til sjóndar. Samstundis er J.A.H. umboð hjá Fíggjarligum Støðufesti. Har kunnu vit síggja púra greitt, eisini sambært O.B., fyrrverandi nevndarformanni í Eik, at Fíggjarligt Støðufesti frá byrjan hevur handlað útfrá, at hasar 500 mió. hoyra gamla bankanum og harvið fíggjarligum støðufesti til, tí tær innganga í sakarmálið móti gomlu leiðsluni í kollsiglda Eik banka. Samstundis kunnu vit vísa á skjal frá KPMG orðað stutt eftir yvirtøkuna av kollsiglda Eik Banka sum staðfestir hetta:

*”The transfer of assets and liabilities will be treated as taxable transfer. This implies that the tax basis for the acquired assets and liabilities should correspond to the values attributed to the assets and liabilities in the opening balance sheet of October 14th 2010 assuming that these assets correspond to fair marked value. No tax assets (including tax losses carried forward) or liabilities will correspondingly exist as of the opening balance sheet date.”*

Og víðari verður víst á, at sama skriv er farið til alla potentiellar keyparar av Eik Banka Føroyar.

Sosialurin svarar kæruni punkt fyri punkt og fer at fyrihalda seg til fjølmiðlaetiska aspektið av hesum málinum, meðan juridisku ósemjurnar lata tey liggja hjá TAKS.

Sosialurin ásannar tó, at í greinini ”her haltar argumentatiónin” er ein faktuellur feilur, sum var rættaður á s. 2 í sosialinum 15. august. Har stendur, at Spekt boðaði frá sínari støðu í 2013, rætta árstalið er 2014, men tað hevur fyri so vítt ongan týdning fyri tað málið. Víðari vilja tey staðfesta, at tey á ongan hátt meta seg hava brotið leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið. Tey meta, at teirra navngivnu keldur og teirra skjøl í málinum eru so mikið álítandi, at tað er rætt av teimum at skriva um málið út frá tí. Samstundis vilja tey vísa á, at í slíkum umfatandi týdningarmiklum málum er tað teirra rættur at nýta dulnevndar keldur.

Síðani verða viðmerkingar gjørdar til tey einstøku punktini.

**Lógargrundarlag**

§ 43 í løgtingslóg nr. 45 frá 16. mai 2006 um fjølmiðlaábyrgd, sum broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2007.

Leiðreglur um góðan fjølmiðlasið frá 14. mai 2008.

**Avgerðin hjá Fjølmiðlanevndini**

Til at viðgera hetta mál var Fjølmiðlanevndin mannað við O.K.M., forkvinnu, og nevndarlimunum J.S., I.S.O., og varalimi Á.G..

Kært er um grein í Sosialinum 17. juni 2016, og um greinar, sum hava verið áður um sama evni. Hesar eru viðlagdar. Kærarin heitir á nevndina um at síggja burtur frá kærufreistini í mun

til greinar árðenn 17. juni, og tað er eisini nærliggjandi at inndraga allar greinar og síggja tær í einum samanhangi, soleiðis sum støðan er í hesum máli. Um metast skal um greinina frá 17. juni 2016, má atlit takast til tað, sum hevur verið frammanundan.

Í kæruni verður í høvuðsheitum víst á skeivar upplýsingar, reingjandi orðingar, ákærandi skriving, men eisni verður víst á manglandi haldgóðar keldur og ikki nøktandi kelduvandni.

Viðv. rættleikanum í sjálvum innihaldinum/upplýsingunum er tað sera trupult hjá nevndini at taka støðu til hetta, tí møguleikarnir at føra prógv fyri nevndini eru sera avmarkaðir, og tí verður tað til, at orð er ímóti orði, sum nevndin ikki kann taka støðu til. Nevndin má tí í høvðusheitinum fyrihalda seg yvirskipað til tað skrivaða og meira til vinkulin í tí skrivaða.

Skattamálið hjá Eik byrjar við, at J. traðkar fram og finst at einum tapi, sum EIK hevur frádrigið í samband við at bankin bleiv keyptur frá Fíggjarligum Støðufesti.

Við atliti at støðuni hjá EIK í tí føroyska samfelagnum, hvør keldan er, og at talan er um ivasom viðurskifti, hevur hetta málið ein stóran samfelagsligan týdning og stórt tíðindavirði.

Miðlarnir fáa eisini eitt víðari rásarúm í einum tílíkum máli, eisini tí tað ber brá av avdúkan, tí talan er um ivasom viðurskifti. EIK, sum má tola, at kritiskir spurningar verða settir.

Nevndin heldur ikki, at grundarlag er fyri at finnast at nøkrum viðurskiftum viðvíkjandi greinunum hjá Sosialinum.

Nevndin viðmerkir tó, at Sosialurin átti at vanda sær betri um orðavalið, og er tað t.d. ikki hóskandi at brúka orðið skattasnýt, ella reka framundir soleiðis at lesarin fær fatanina av, at talan er um skattasnýt. Miðlarnir hvørki kunnu ella skulu taka støðu til rættin hjá EIK til frádráttin, ella um EIK tilvitað hevur tikið frádráttin av órøttum, áðrenn hetta veruliga er staðfest, men grundarlag er hjá miðlunum at seta spurnartekin við hetta. Víst verður til prinsippið um, at ongin er sekur áðrenn hann er dømdur, som framgongur av leiðreglu 4.5. Tann støða, sum leiðregla 4.5 beinleiðis fevnir um, er tó ikki relevant í hesum máli. Sosialurin letur tó generelt skuldarspurningin standa opnan, og tað bøtir um støðuna.

**Vísandi til omanfyri standandi metir nevndin, at grundarlag ikki er fyri at geva Sosialinum átalu viðvíkjandi greinini ”Her haltar argumentatiónin” tann 17. juni 2016, ella greinunum áðrenn hetta.**